miðvikan
Nr. 34 • 18. feb. 2009
Siðsøguligt tilfar
í Sosialinum mikudagar

**Tollakur Dam:**

# Úr Kollafirði til Íslands

**Kári við Stein, okkara maður í Grønlandi, eigur ein mammubeiggja, sum eitur Tollakur Dam. Hann hevur sum so mangur roynt eitt sindur av hvørjum bæði á sjógvi og landi. Hann er so endaður í Íslandi sum nógvir aðrir føroyingar. Tá ið Kári vitjaði Tollak seinasta summar fekk hann Tollak at greiða sær frá brotum í sínum lívi**



**Óli Jacobsen**
olij@sosialurin.fo

Tollak er føddur 24. februar 1930 á Miðgerði í Kollafirði. Fyrstu ferð, hann fór til Íslands at arbeiða, var 16. juni 1946. Hetta var á einum bóndagarði, sum ein danskur prestur átti. Tað var vanligt tá í tíðini hjá ungum dreingjum at fara til Íslands at arbeiða á bóndagørðum.

Hetta var á Løjanesi við Reykjavík. Her er nú alt horvið av allari teirri útbygging, sum hevur verið síðani. Tollak skuldu mjólka 100 kúm morgun og kvøld. Lønin skuldi vera kr. 700 um mánaðin, men tá ið fyrsta lønin kom, var hon bert kr. 500. Tað vísti seg, at ein føroyskur millummaður, sum hevði skaffað honum arbeiðið, fekk munin.

Hetta tímdi Tollak ikki, so hann rýmdi av garðinum. Hann byrjaði at arbeiða á kaiuni í Reykjavík við at lossa damparar og at landa fisk. Síðan fór hann at arbeiða hjá Reykjavíkar Kommunu. Her arbeiddi hann saman við 15 øðrum føroyingum.

Teir gróvu rør niður, og "tey vóru tung, sum eg veit ikki hvat", sigur Tollak.

Í 1947 fór Tollakk við einum línubáti frá Høfn. So fór hann aftur til kommununa. Aftaná fór hann við einum snurpubáti eftir sild í Dalvík. Har var hann við til at rógva snurpunótina út. Tað vóru tveir bátar, um 25-30 tons til støddar, sum snurpaðu saman. Teir fingu nógva sild.

Íslendingar høvdu leigað tríggjar sluppir úr Føroyum til hesa veiðu. Við eini av hesum sluppum var systkinabarnið hjá honum Theodor. Hann var sonur pápabeiggja hansara Martinius Dam úr Vágunum. Teir komu á Vestmanna í september.

## Við føroyskum skipum

Seinni um heystið í 1947 fór Tollak við trolaranum Torfinni, sum hann var við, inntil Torfinnur varð seldur. Tað var Jákup á Trøðni, sum keypti Torfinn. Hann fekk seinni navnið Bakur. Her var Tollak við til juni 1951. Tá fór hann til Grønlands við Hjørdis. Teir royndu við línu at byrja við. Tað gav lítið, men so løgdu teir um til trol, og tá hjálpti. Sámal P. Petersen úr Fuglafirði átti Hjørdis, og Kristian Danielsen, pápi Birgir, úr Kvívík var skipari um hetta mundi. Hann var eisini beiggi DD, kenda læraran í Sørvági.

Teir komu heim í november og høvdu fiskað 200 tons tilsamans. Í 1952 fór Tollak við Silver Belle á Suðurlandið, men tað gekk einki serligt. Teir komu aftur til Føroyar páskadag 27. apríl.

## Við norðmonnum

Í mai mánaði stóð í bløðunum, at norðmenn søktu eftir fólki. Teir fóru tríggir úr Kollafirði. Umframt Tollak vóru teir Poul Hammer og Hans á Kjalnesi. Farið varð við Nordholmen til Grønlands. Hesa tíðina vóru tað eisini nógvir føroyskir fiskimenn, sum sigldu við norðmonnum. Fiskaríið var brúkiligt.

Teir landaðu í Føroyingahavnini. Har kom tað fyri at teir landaðu eitt sindur umborð í eitt farmaskip úr forlastini. Fyri hetta fingu teir 1 kr fyri kg. Teir í Føroyingahavnini landaðu afturlastina, og fyri hetta fingu teir bert 60 oyru fyri kg. Soleiðis kundi tað eisini vera.

Teir landaðu einar 3-4 ferðir í Grønlandi tann túrin og komu heim síðst í oktober.

Ì januar 1953 fóru teir á sild við Nordholmen. Tá ið sildin var liðug, varð farið til Grønlands aftur. Har gjørdu teir tveir túrar og vóru aftur seinast í oktober.

Í 1954 fóru teir aftur til Noregs. Tá hevði reiðaríið keypt ein størri bát, sum æt Granit. Við honum vóru teir fyrst á sild. Teir fóru til Grønlands í mai. Tá komu tveir aðrir kollfirðingar við. Annar kallaðist Hjørleif. Teir gjørdu tveir túrar og komu heim í oktober.

Tá teir vóru á sild við snurpunót fiskaðu teir bert um dagin. Teir fóru hvønn dag inn at landa og løgu fyri akkeri um náttina. Køstini kundu vera ójøvn. Onkuntíð fyltu teir bátin, last og dekk. Tá tað stóð so væl til, at Norholmen var fullur og meira var í nótini, róptu teir á annan bát um at taka restina. Tað vóru altíð nakrir smáir bátar klárir har í nánd, sum tóku 30-40 tons hvør av sild. Um teir hjálptu teimum at fáa sildina umborð á Nordholmen, fingu teir 10% av fonginum. Men um teir førdu sildina inn á land fyri teir, fingu teir 40% av fonginum. Hasir smærru bátarnir løgu altíð klárir at hjálpa sildaflotanum har um leiðir. Nordholmen var ein lítil bátur. Hann tók 1700 hl av sild, eini 200 tons.

Í 1955 fóru teir aftur til Noregs á sild við Granit og so aftur til Grønlands. Tá var Tollak bert við tann eina túrin. Um heystið sama árið varð hann biðin til Íslands við einum trolara, Ingolfur Arnason úr Reykjavík. Har var hann við, til hann kom heim til jóla. Í 1956 fór hann yvir aftur við sama trolara, til hann kom heim á ólavsøku 1957.

Hetta var júst um ta tíðina, tá ið føroyskir fiskimenn í hópatali fóru til Íslands at fiska og eisini at arbeiða á landi.

Tollak fór yvir aftur, og nú fór hann við trolaranum Halla Fróðadóttir. Har fór hann við aftur í 1958, og hann fór síðan við trolaranum Kallsevni hjá Kimbil. Á heysti fóru teir á ísfisk.

Í 1959 fór Tollak umborð á Ísborg úr Patreksfirði. Teir gjørdu ein rimmar túr í New Foundlandi. Teir fiskaðu í 46 tímar. Tá var Ísborg á tremur av kongafiski. Hann tók um 400 tons. Teir komu heim í mai.



*Hjørdis*

## Útróður í Grønlandi

So at rógva út í Borgshavn saman við kvívíkingum. Báturin æt Glansur og var eitt kent navn í grønlandsútróðri. Manningin var umframt Tollak brøðurnir Tórstein og Leivur Grækarisson úr Kvívík, Dánjal Martin Jacobsen úr Sandvík, Olivar Debes frá Gjógv og Hans Dánjal Joensen úr Miðvági.

Teir fóru yvir við einum avgomlum dampara sum æt Rask. Kári minnist væl tann rustklumpin, sum lá á Havnini og tók bátar og fólk umborð. Minnist hann rætt, skuldi hann eitast at vera svartmálaður, men tað sást meira til rust enn máling. Hetta skip hevur Anton Petersen eisini greitt frá í síni frásøgn um útróður í Grønlandi.

Tað vóru 29 bátar við. Tollak segði, at koyggjurnar vóru gjørdar av óhølvaðum viði. Tað vóru nokk so nógvir, sum tóku flísar við sær í land uttan at vita av tí. Teir komu í øllum góðum til Borgshavn. So at fáa alt í land. Tá so Rask fór út eftir vágni stóðu teir sum ryssa yvir deyðum fyli.

So var at smíða skúrarnar. Teir fingu tað gjørt soleiðis, at komfýrurin kom upp at standa hóskvøld, so teir kundu kóka sær tann fyrsta bitan áðrenn midnátt. Skúrurin bleiv liðugur, og teir fóru fyrsta dagin til útróðrar 4. juli. Hetta árið fingu teir 55 tons í saltfiski. Teir komu heim á Havnina 25. oktober við einum donskum dampara, sum kallaðist Fursund. Hann hevði meira máling enn Rask og var gráur á liti.



*Tollakur við einum abbasoni*